Margretha Nónklett, samskipari hjá Amnesty í Føroyum:

# Ársfrágreiðingin hjá Amnesty International viðkomandi fyri Føroyar

**Ársfrágreiðingin hjá Amnesty International varð almannakunngjørd í gjár. Endamálið við ársfrágreiðingini, sum fevnir um 150 lond, er at varpa ljós á brot ímóti mannarættindum**

AMNESTY
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Brot ímóti mannarættindum vóru orsøk til, at fleiri milliónir mannalív vórðu oyðiløgd í 2005:

– Tí er neyðugt, at Amnesty heldur fram við at varpa ljós á trupulleikarnar og setir átøk í verk, ið veruliga muna í altjóða samfelagnum, sigur Margretha Nónklett, samskipari hjá Amnesty í Føroyum.

Ársfrágreiðingin verður ofta nevnd »svartabók«, og er tað skomm at verða nevndur í ársfrágreiðingini hjá Amnesty. Føroyar hava ongantíð verið við í ársfrágreiðingini, men Danmark var fyri nøkrum árum síðani í samband við isolatiónsfongsling:

– Tá var ramaskríggj í Danmark, og nógv varð sett í verk fyri at forða fyri, at Danmark varð nevnt aftur í frágreiðingini, sigur Margretha Nónklett og leggur afturat, at hóast Føroyar ikki beinleiðis eru nevndar í frágreiðingini, er frágreiðingin avgjørt viðkomandi fyri okkum:

– Vit eru ein partur av altjóða samfelagnum, so sjálvandi er ársfrágreiðingin eisini viðkomandi fyri okkum. Um vit taka eitt ítøkiligt dømi, staðfestir ársfrágreiðingin eitt nú, at fleiri lond í Evropa loyva loyniligum fangaflutningi. Hóast Føroyar ikki beinleiðis verða nevndar í ársfrágreiðingini, er hetta eisini viðkomandi fyri okkum, tí tað varð staðfest, at eitt loyniligt flogfar hjá CIA fleyg millum Ísland og Ungarn í 2005. Landsstýrið eigur tí, á sama hátt sum hini evropeisku londini, at taka lut, tá tað snýr seg um at steðga ólógligum fangaflutningi. Vit eiga at tryggja okkum, at føroyskt loftrúm ikki verður nýtt til ólógligan fangaflutning, sigur Margretha Nónklett.



*– Eins og vit mugu fordøma yvirgangsatsóknum, eiga vit á sama hátt at arbeiða ímóti krøvunum hjá stjórnum, sum halda, yvirgangur kann berjast niður við píning. Hetta kann sammetast við at royna at sløkkja bál við brennievni, segði Irene Khan, aðalskrivarnin hjá Amnesty International, tá hon almannakunngjørdi ársfrágreiðingina.*

**Ársfrágreiðingin**

Í ársfrágreiðingini verður millum annað staðfest, at »kríggið móti yvirgangi« hevur havt við sær, at altjóða mannarættindi eru skúgvað til viks, tí stjórnir loyva píning, loyniligan fangaflutning og vantandi rættargongd.

Frágreiðingin vísir somuleiðis á, at trygdarætlanin hjá teimum valdhavandi londunum í stóran mun elvir til, at aðrar álvarligar kreppur ikki verða sæddar:

– Lætta atgongdin til hondvápn elvir somuleiðis til meira harðskap, leggur lunnar undir nýggjar kreppur og leingir um kríggj. Vantandi vápnaeftirlit hevur við sær, at vápn lættliga verða seld til stjórnir, sum eru tiltiknar fyri at fremja brot á mannarættindi. Hóast hondvápn eru orsøk til um 500.000 andlát um árið, er einki altjóða eftirlit við vápnaútbreiðslu, greiðir Margretha Nónklett at enda frá.

## Deyðarevsing

Í minsta lagi 2.148 fólk vórðu avrættað í 2005, men hesi tøl eru bert toppurin av ísfjallinum, tí nógv lond fremja loyniligar avrættingar.

Rættarligar avrættingar vórðu framdar í minsta lagi 24 londum. Kortini eru nøkur fá lond, sum standa fyri størsta partinum av avrættingunum: 94 prosent av øllum avrættingunum vórðu framdar í Kina, Iran, Saudi Arabia og USA.




**FAKTA**

**Høvuðskrøvini hjá Amnesty International 2006:**

- At ST og Afrikanska samtakið viðgera kreppuna í Darfur og forða fyri framhaldandi brotum ímóti mannarættindum.
- At ST samtykkir eina avtalu um altjóða vápnaeftirlit.
- At USA letur Guantánamoleguna aftur og almannakunnger nøvn og uppihaldsstøð hjá fangum, sum eru hildnir aftur vegna illgruna um luttøku í yvirgangsvirksemi.
- At nýggja Mannarættindaráðið krevur tað sama, uttan mun til um tað snýr seg um Darfur, Guantánamo, Chechnya ella Kina.

# Barnadeildin á LS betri umstøður

**Hósdagin í farnu viku var móttøka á Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum í sambandi við, at Barnadeildin er flutt av 4. og upp á 5. hædd. Hereftir skulu vit venja okkum við ikki at siga B4 men B5 um hesa deildina**

BARNADEILDIN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

– Broytingin á Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum hevur verið ótrúliga stór seinastu 50 árini. Nú hava vit so stórt pláss, at vit næstan kunnu velja ímillum, hvar vit vilja vera, segði Odmar Færø, yvirlækni, í skemti á móttøkuni.

Í staðin fyri lítlu og myrku kanningarstovuna á gomlu barnadeildini, hevur Barnadeildin nú fingið eina stóra, væl útgjørda og ljósa kanningarstovu. Eisini er starvsfólkarúmið rúmligari, og deildarsjúkrarøktarfrøðingurin hevur fingið sína egnu skrivstovu:

– Somuleiðis hava vit fingið isolatiónsstovu við slúsu, kitlum og vaski, og hevur hetta verið sera hent hjá okkum, nú kikhosti hevur gingið. Seingjarstovurnar hava allar fingið egið vesi og bað, og verður vandin fyri smittu á henda hátt minni millum børnini, enn tá øll nýttu sama vesi og skiftu blæu í sama rúmi, segði Fróði Joensen, barnalækni og skoytti uppí, at størsta broytingin er tó dagdeildin:

– Á nýggju dagdeildini, sum vit hava fingið, kunnu vit hava ambulantar vitjanir og kanningar, ið ikki krevja, at barnið svevur á sjúkrahúsinum. Hetta fer at lætta um á seingjardeildini.

Men Fróði Joensen viðgekk tó, at framvegis er ein partur av børnum, sum als ikki hava fingið lut í núverandi betran av hølunum:

– Teir sjúku nýføðingarnir liggja framvegis stúvaðir saman á einari lítlari stovu á føðideildini. Vónandi fer tað skjótt at bera til at skapa teimum betri kor eisini.

Alt í alt eru øll á Barnadeildini sera fegin um ábøturnar á deildini og hava samstundis góðar vónir um at sleppa upp í part, tá næsta nýbyggingin á Landssjúkrahúsinum gerst veruleiki



*Á móttøkuni vórðu Odmar Færø, fyrsti barnalækni á Landssjúkrahúsinum, og Fróði Joensen, barnalækni, heiðraðir av starvsfólkunum á 5. hædd fyri gott arbeiði fyri Barnadeildina øll hesi árini*



*Marita Tórsheim frá Barnabata lat Tove Thomsen, deildarsjúkrarøktarfrøðingi, og Esther Djurhuus, pedagogi, Playstation II*